UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Dagfesting: **25. november 2021**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 21/08502-56**

**Svar**

**upp á**

**skrivligan fyrispurning nr. 52-088/202 frá Eyðgunn Samuelsen, løgtingskvinnu, settur Jenis av Rana, landsstýrismanni í uttanríkis- og mentamálum eftir § 52a í Tingskipanini. Um neyð- og menningarhjálp.**

**Fyrispurningurin er soljóðandi:**

1. Hvørjir felagsskapir og verkætlanir hava fingið stuðul til ávikavist neyðhjálp og menningarhjálp í 2020?
2. Hvussu nógvan stuðul hava omanfyrinevndu felagsskapir og verkætlanir fingið játtaðan í mun til upphæddina, ið søkt varð um?
3. Verður øll játtanin brúkt í ár?

**Svar**

**Til 1 og 2:** Fylgjandi felagsskapir og verkætlanir hava fingið stuðul til ávikavist neyðhjálp og menningarsamstarv í 2020.

Um annað ikki er upplýst, hevur stuðulin samsvarað við fullu upphæddina, søkt varð um:

**Menningarsamstarv:**

Blái Krossur – 500.000
P/f Fiskaaling – 200.000
Chase Africa – 188.491
Guðrun&Guðrun – 71.960
New Life Africa International – 170.000
Mirjam/ABC Children's Aid Kenya – 68.533
Heimamissiónin/SAT7 Academy – 303.782
Action Aid – 415.890
Føroyska Barnahjálpin – 26.500
ChildeHope UK – 362.556

Upplýsast kann, at Guðrun&Guðrun søktu um ein samlaðan stuðul á 133.000 kr.; tó var partur av umsóknini til virksemi, ið ikki fellir innanfyri tað, ið stuðlað verður sambært leiðreglunum um stuðul til menningasamstarv og neyðhjálp. Á heimasíðu Uttanríkis- og mentamálaráðsins ber til

at lesa meira um menningarsamstarv og neyðhjálp, umframt og at síggja leiðreglur fyri stuðul v.m.

Føroyska Barnahjálpin søkti um ein samlaðan stuðul á USD 52.200; tó var partur av umsóknini til virksemi, ið ikki fellir innanfyri tað, ið stuðlað verður sambært leiðreglunum um stuðul til menningasamstarv og neyðhjálp.

**Neyðhjálp:**

Reyði Krossur Føroya – 2.000.000
Mercy Ships – 200.000
Open Doors – 1.000.000
Action Aid – 100.000
Mirjam – 100.000
Life for a Child Føroyar – 150.000
Skandinaviska Barnamissiónin – 50.000
ABC Children's Aid Pakistan – 46.185
ABC Children's Aid Philippines – 43.106
Næstin/NLAI – 100.000
OM Føroyar (Tadjikistan) – 500.000
OM Føroyar (Miðeystur) – 500.000
Beirut, Libanon (landsstýrið umvegis Reyða Kross) – 500.000
World Food Program – 1.402.276

Viðmerkjast skal, at í summum førum er stuðulin útgoldin í útlendskum valuta; ómaksgjøld í hesum sambandi eru eisini farin av játtanini.

**Til 3:** Ja

Vinarliga

Jenis av Rana
*landsstýrismaður*